Landssjúkrahúsið




# Isolatión á sjúkrahúsinum - kunning til tey avvarðandi

## Isolatión á sjúkrahúsinum

## - til tey avvarðandi

Hvat merkir tað, at sjúklingurin er í isolatión?

- Sjúklingurin liggur á einastovu
- Sjúklingurin hevur egið vesi
- Eitt skelti er á hurðini til stovuna, sum vísir, at her er isolatión
- Starvsfólk eru í handskum, plastiksvintu og møguliga masku og brillum, tá ið tey eru inni hjá sjúklinginum
- ØLL - bæði starvsfólk og avvarðandi - skulu spritta hendurnar grundiga aftaná samband við isolatiónssjúklingin. Í summum førum krevur isolatión, at tit vaska hendurnar, áðrenn tit nýta spritt. Spyr starvsfólkið

## Hví isolatión?

- Endamálið við isolatión og øðrum smittufyribyrgjandi tiltøkum er at minka um smittubreiðslu
- So skjótt sum vandin fyri smittu er av, verður isolatiónin avtikin

## Vitjandi

- Vitjandi skulu seta seg í samband við starvsfólkið, áðrenn farið verður inn í stovuna
- Vitjandi skulu ikki nýta vernd, uttan so at tey eru við í røktini
- Vitjandi skulu ikki vitja aðrar sjúklingar, sama dag sum tey vitja sjúkling, ið er í isolatión
- Vitjandi skulu vaska og spritta hendurnar, tá ið tey fara úr stovuni. Røktarfólkið vegleiða í hesum

## Ráð og vitan

Ert tú í iva, ella tørvar tær meira vitan um smittuvandan, set teg í samband við starvsfólkið á deildini.

Landssjúkrahúsið

Klinisk dygdardeild

tel 304500, www.ls.fo